## Norðurkorea hóttir við kríggi

Norðurkoreanska stýrið segði í morgun, at verður roynt at forða landsins ætlaðu rakettroynd, kann tað elva til kríggj. Hóttanin bleiv lisin upp í sjónvarpinum í morgun. Eygleiðarar vísa á, at hóttanin kemur beint undan einari stórari hernaðarvenjing, sum Suðurkorea og USA hava í felag, og sum Norðurkorea hevur mótmælt. Norðurkora hevur boðað frá, at landið fyrireikar seg til at royna ein fylgisvein, sum skal hava friðarlig endamál. Men fleiri onnur lond halda, at fylgisveinurin er eitt álpsvápn, skrivar Reuters.



## Leggja trýst á Jóhonnu

Í Íslandi er Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri, undir stórum trýsti frá fólki, sum vilja hava hana at stilla upp til formansvalið í Samfylkingini, eftir at verandi formaður, Ingibjørg Sólrún Gísladóttir, rættiliga óvæntað hevur kunngjørt, at hon gevst í politikki. Tað eru bara átta dagar, síðani hon boðaði frá, at hon fór at stilla upp aftur til Altingið og formansvalið í flokkinum. Seinasta vikuskiftið hótti fyrrverandi javnaðarformaðurin Jón Baldvin Hannibalsson við at stilla upp til formansvalið, um verandi formaður ikki legði frá sær. Tað ger hon nú, og Jón Baldvin vil nú hava Jóhonnu Sigurðardóttir at taka við.

# Krevja eina virðiliga føroyska sjóvinnu



*– Tað má sum heild vera skil á, um fólk skulu hava virðing fyri sjóvinnuni, sigur afturvaldi formaðurin í Maskinmeistara-felagnum, Páll Hansen og sipar til mál, sum Topaz og Orion*

*Mynd: Leif Láadal*

**Mál sum tað við Topaz, Orion og nú eisini Atlantic, sum hevur ligið tríggjar mánaðir í Danmark, uttan at manningin hevur fingið løn, skaða føroyska sjóvinnu. Tað sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum Páll Hansen, sum varð afturvaldur í tvey ár á aðalfundi felagsins leygardagin**

MASKINMEISTARAFELAGIÐ
*Leif Láadal*

Roynt verður í hesum døgum at selja Føroysku Skipaskrásetingina uttanfyri landoddarnar. Meiningin er at fáa so nógv útlendsk skip sum gjørligt at hava heimstað í Føroyum. Tankin við hesum arbeiði er góður, men so leingi føroyingar sjálvir ikki duga at arbeiða eftir reglunum, verður torført – fyri ikki at siga ógjørligt – at skapa virðing rundanum FAS-skipanina.

Somikið bersøgin var formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, tá hann í formansfrágreiðing síni á aðalfundinum hjá felagnum, leygardagin, tók samanum fakfelagsárið, ið er runnið.

– Eg kenni ikki so nógv til málið um Atlantic, sum er skrásettur í Føroyum, men sum eg skilji á lagnum, so liggur skipið, og menninir hava ikki fingið løn í tríggjar mánaðir. Málini um Topaz og Orion kenna vit øll, og tað eru júst sovorðin mál, sum ikki mugu koma fyri, um FAS skal hava nakran kjans at gera seg galdandi sum alternativ til útlendskar skipaskrásetingar, sigur Páll Hansen, og leggur afturat, at tað sjálvsagt ikki bara er í mun til skipaskrásetingar, at virðiligt viðurskifti mugu galda í sjóvinnuni:

– Tað má sum heild vera skil á, um fólk skulu hava virðing fyri sjóvinnuni, sigur hann.

### Røra ikki Topaz

Maskinmeistarafelagið hevur verið aktivt í ávísum málum, tá limir felagsins ella útlendskir maskinmeistarar ella maskinistar eru komnir illa fyri, men tað er ikki altíð, at felagið fer upp í leikin. Viðvíkjandi feskasta málinum – tað um Topaz, sum liggur og gnaddar gummi í Las Palmas við manning, sum ikki fær hýru – hevur felagið valt at ikki at fara upp í málið. Í hvussu so er ikki enn.

– Vit hava ráðført okkum við bæði advokat og onnur norðurlendsk maskinmeistarafeløg, og tey ráða okkum øll til at halda okkum vekk frá málinum, sum tað sær út nú, sigur Páll Hansen.

Í Orion-málinum fór felagið upp í málið, sjálvt um talan var um ein útlendskan maskinmann. Tað var nevniliga ein føroyskur reiðari, sum skyldaði manninum løn, og tá slíkt hendir, kann felagið fara upp í leikin, um tað heldur tað er ráðiligt, og fer eisini at gera tað í framtíðini, sigur Páll Hansen.

### Ikki so góð sum DIS

Men eitt er virðing fyri einari føroyskari sjóvinnu, eitt annað eru pengar. Tað er nevniliga so, at FAS-skipanin sum er, ikki er líka góð rent fíggjarliga, sum danska DIS-skipanin, tá inntøkurnar fara niðurum 35.000 krónur um mánaðin.

Í sambandi við eina lógarbroyting sum kom í gildi við ársbyrjan í ár fyri FAS, har sjómenn skulu gjalda 35 prosent í skatti og reiðaríið fáa eina afturbering uppá 35 prosent, gjørdi Maskinmeistarafelagið eina útrokning í mun til DIS-skipanina.

Tað vísir seg, at lønir lægri enn 35.000 kr. um mánaðin fáa hægri skatt enn áður. Hetta er ein trupulleiki, sum kann minka um áhugan fyri FAS, sigur nevndin, tí sum tað kom fram á aðalfundinum, so er politiskur vilji fyri at styrkja um føroyska sjóvinnu, sum skal kunnu umsita fyri tvær milliardir krónur í 2015 (í 2006-krónum). Tað var í hvussu so er tað, sum eitt av 2015 álitunum legði upp til.

So er bara spurningurin, hvussu nógv afturat nevndini í Maskinmeistarafelagnum minnast 2015 ætlanina hjá fyrrverandi landsstýrinum.

**FAKTA**

**Mál, sum Maskinmeistarafelagið raðfestir:**

- Mótmæla skerjingum á Vinnuháskúlanum.
- 15 prosent í eftirløn í 2018.
- Uppgradering av maskinmeistara til bachelor.
- Broytingar í FAS-skipanini.
- Virðing fyri føroyskari sjóvinnu.
- Samanlegging við motorpassarunum.

# Fyrrverandi formaðurin bjóðaði av



*Jógvan Nybo, fyrrv. formaður, varð ov stuttur, tá hann royndi at koppa Páll Hasen sum formanni í MF*

*Mynd: Leif Láadal*

**Fyrrverandi formaðurin Jógvan Nybo bjóðaði Páll Hansen av sum formann í Maskinmeistarafelagnum (MF), men hann var ov stuttur**

AÐALFUNDUR
*Leif Láadal*

Tá atkvøðurnar vóru upptaldar, fekk sitandi formaðurin Páll Hansen tríggjar ferðir so nógvar atkvøður sum avbjóðarin, Jógvan Nybo.

Tveir av fýra nevndarlimum stóðu annars fyri vali á aðalfundinum. Annar teirra, næstformaðurin Regin Olsen, varð afturvaldur, meðan Ólavur Gunnarsson varð nývaldur í nevndina. Nevndarlimirnir Petur Egholm og Jóan Petur Paturson stóðu ikki fyri vali í ár. John Højsted er nývaldur tiltakslimur, meðan Eirikur Gunnarsson varð afturvaldur.

Sjálvt um nógv evni, ið hava við maskinmeistarar og maskinistar at gera, hava verið frammi seinasta árið, so hildu fleiri limir, at felagið átti at gjørt nógv meira vart við seg. Sum dømi var nevnt málið um skerjingarnar á Vinnuháskúlanum, har meiningin hjá Maskinmeistarafelagnum ikki kom nóg greitt til sjóndar.

Og hetta var júst ein av grundgevingunum hjá Páll Hansen yvirfyri aðalfundinum fyri at velja seg aftur. Hann bar fram, at felagið hevur arbeitt, og framhaldandi fer at arbeiða fyri einum sjónligari felag.